

Mynd: Sunva Ey. Lassen

# Tómur Tórsvøllur

**Fótbólturin tykist fylla minni og minni fyri hvørja ólavsøku. Nú er steypafinalan eisini strikað av skránni, og tí verður talan í besta føri um feriufótbólt**

**FÓTBÓLTUR**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fram til 1992 taldust ólavsøkudystirnir millum hæddarpunktini hjá teimum, sum vóru í og kring tey bæði stóru høvuðsstaðarfeløgini. Hóast talan bert var um sonevndar vinadystir, so var talan um dystir, sum stór orka varð løgd í. Bæði tí talan var um steypadyst, men eisini tí hetta gav spælarunum á vinnandi liðnum høvi at ganga upprættir gjøgnum alla hátíðina.

Og við táverandi 18 umførunum í 1. deild, umframt heimligu steypakappingina, var dystartalið hjá spælarunum ikki nøkur ræðandi skrá. Og tí var als eingin trupulleiki at motivera spælararnar hjá liðunum til dystin. Heldur ikki teir hjá TB ella KÍ, ið aloftast vóru mótstøðuliðini hjá ávikavist B36.

Tann broyting, sum kom í 1992 var tó, at altjóða fótbóltur eisini kom á skránna hjá føroyskum fótbóltsfeløgum.

Tað bar millum annað við sær, at málið, sum spælararnir nú sóu fyri framman, fullkomuliga tók glansin av ólavsøkudystinum. So spennandi sum hesin annars kundi tykjast. Sjálvandi vildu liðini framvegis vinna, tá tey fóru á vøllin, men við altjóða uppgávum stutt eftir ólavsøkuna tæntu hesir dystir nú í nógv størri mun sum upphiting til eina størri hending. Heldur enn at vera ein hending í sjálvum sær.

### Finalan lyfti tignina

Tað var tí eitt tiltrongt lyft til ólavsøkufótbóltin, tá FSF í 2001 setti steypafinaluna á ólavsøkuskránna. Har hevði hon eisini verið eina ferð áður, men ta ferðina elvdi tað til sannan ruðulleika millum FSF, Tórshavnar býráð og havnarfeløgini, sum avgjørt ikki høvdu hug at siga nei-takk til tær inntøkur, sum tey annars kundu forvinna sær burtur úr dystinum.

Munurin hesa ferð var tó, at tað hesa ferð eisini gav góða meining fyri havnarfeløgini, at slíkur stórdystur varð partur av ólavsøkuskránni. At nakað av tign nú aftur kom í fótbóltin á ólavsøku, sum í nøkur ár var meira merktur av feriu og hugna, heldur enn kappingarfótbólti.

### Altjóðagerðin

Og nú er so vandin fyri, at júst hugni og feria aftur verður tað, sum merkir fótbóltin á ólavsøku. Í fjør var tað sum so ikki ætlanin, men drúgva HB-málið í steypakappingini forðaði fyri, at nøkur finala kundi spælast á ólavsøku.

Men sum so var tað bara ein spurningur um tíð, áðrenn finalan varð flutt. Altjóða dystirnir liggja alt nærri sjálvari ólavsøkuni, og tó at hepnið hevur spælt við FSF í so máta higartil, so var væl bert ein spurningur um tíð, áðrenn annar av finalupørtunum rendi seg í altjóða uppgávu samstundis.

Hinvegin, so kann tað jú eisini verða so, at altjóða fótbólturin okkurt árið bjargar ólavsøkuni. Eitt nú vóru heilt nógv fólk og hugdu at, tá B36 ólavsøkuaftan fyri tveimum árum síðani sendi íslendska ÍBV úr UEFA-cup kappingini.

Fyri fótbóltin. Fyri ólavsøkuna og fyri føroysku feløgini er at vóna, at ein slík støða fer at endurtaka seg. Ger hon ikki tað, er vandin, at fótbólturin á ólavsøku bert verður ein týdningarleysur venjingardystur, har tíggjutals útskiftingar og lítil seriøsitetur fer at merkja dystirnar, sum verða spældir.